# Stríðið um múrin

KIRKJUBØMÚRURIN

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Fyrst í 1997 vóru tvær ætlanir fyri múrin í Kirkjubø lagdar framm. Onnur kom úr Føroya Fornminnissavni, hin frá einum áhugabólki, sum var mannaður av Páll Patursson, bónda í Kirkjubø, Tróndur Paturson, listamálara, og J.P. Gregoriussen, arkitekti.

Hetta var byrjanin til eitt langt stríð, um hvør loysn var best, og hvat skuldi gerast við Múrin. Skiftandi mentamáláráðharrar høvdu ymiskar áskoðanir, og gjógvin millum tey, sum vildu verja, og tey, sum vildu brúka, var djúp. Í 2001 varð ein Múrnevnd sett, sum skuldi sameina allar partar og koma við tí góðu loysnini.

Vit hava leitað í arkivunum hjá Sosialunum og funni nøkur sitat frá heita kjakinum hesi árini. Allir partar komu til orðana, men oddagreinarnar tóku týðiliga støðu.

*Páll Paturson í lesarabrævið í Sosialinum 25. November 1997*
Eg haldi, at Múrurin er ein náttúrligur bygningur, og tí haldi eg, at besta verja má vera at verja hann á náttúrligan hátt, við tekju, hurðum og vindeygum, og ikki seta hann inn í eitt ella annað. Hann er bygdur at standa úti, men undir taki.

Landsantikvarur Arne Thorsteinsson segði í Degi og Viku herfyri, at okkara Verkætlan vildi skaða Múrin. Eisini segði hann at nú mátti Múrurin verjast móti menniskjum. Spurningurin er hvørjum menniskjum? Embætismenn og yvirvøld hava ikki altíð verið tey bestu menniskju fyri fornminnini í Kirkjubø.

Múrurin er og verður í mínari verð Dómkirkjan, Magnus Katedralurin, sum myndugleikar og embætismenn eftir trúbótina hava rivið takið av, vindeygu og hurðar úr, og flutt ella selt tað burtur. Nú er tíð uppá at fáa alt hetta gjørt aftur, og ongantíð ov skjótt.

*Símun V. Arge, táverandi savnsvørur á Føroya Fornminnissavni í samrøðu við Sosialin 16. apríl 1998*
Tað er skelkandi at hoyra, at Múrurin skal gerast til brúksbygning fyri at nýta hann í ferðamannavinnuni. Sjálvandi skal hann vísast fram fyri ferðafólki, men hann kann og skal ikki nýtast til annað enn tað hann er, nevniliga eitt fornminni.

*Oddagrein í Sosialinum 6. juli 1998*
Lógin hevur ikki til endamáls, at einhvør Hanus og Janus, sum ikki tolir sýnið av einum fornminni, ið stendur sum toft, skal sleppa at gera hesa toft til brúkshús.

Lógin hevur hinvegin til endamáls at tryggja okkum og okkara eftirkomarum, at jarðføst fornminni fáa frið. Hetta endamál kann ikki røkjast, um hægsti myndugleiki setir allan sakkunnleika og allar viðkomandi stovnar til viks, hvørja ferð onkur smartur persónur ella ørvitisknokkur fær eitt smart hugskot. Tað er júst hesum smartu og ørvitisknokkunum lógin skal verja fornminnini ímóti.

*Samrøða í Sosialinum, 15. Juli 1998 við Annfinn Brekkstein, táverandi bygdaráðsformanni í Kirkjubøar kommunu, um ætlanirnar hjá Forminnissavninum*
Eg trúgvi, at tað teir fara í holt við tekur ikki 2-3 ár, men millum 10-20 ár. Tað er eitt líknandi dømi um, at arbeiðið skuldi taka 2-3 ár, men nú 13 ár eru liðin síðani farið varð í gongd, veit eingin, hvussu langa tíð tað tekur, áðrenn tað verður liðugt. Tað tekur altíð longri tíð enn teir siga.

*Torbjørn Jacobsen í samrøðu við Sosialin 27. Juli 2000, stutt eftir at hann varð settur sum landsstýrismaður í mentamálum*
Tað ræður um at avgreiða mál, og eg síggi onga orsøk til, at t.d. Kirkjubømúrurin framhaldandi skal verða smoygdur undan einari politiskari avgerð

*Oddagrein 6. Juni 2001 (tá Óli Holm varð settur sum nýggjur landstýrismaður í mentamálum)*
Vónandi fer nýggi landsstýrismaðurin at ... lata lóg og landaskil valda, tá tað snýr seg um største fornminni okkara, Múrin í Kirkjubø, og aftur letur myndugleikan og stovnin á hesum øki málið upp í hendi.

*Torbjørn Jacobsen í grein í Sosialinum 13. Juni 2001 í samband við at hann - tveir dagar áðrenn hann fór frá sum landsstýrismaður - setti Múrnevndina við Petur F. Zachariassen sum formanni*
– Vit kunnu staðfesta – bara við at hyggja at múrinum – at tað hevur verið tosað um hann í ártíggjur, í árhundrað, men einki er hent.

Man hevur ikki kunnað loyst upp fyri nøkrum sum helst. Og hesum havi eg so tikið avleiðingarnar av og valt ein mann, sum vit í Mentamálastýrinum hava stóra virðing fyri og stórt álit á.

# Múrurin tykist tungur at syfta



*Kirkjubømúrurin, sum hann sær út í dag*

**Í 2001 varð ein »skjótt-arbeiðandi« nevnd sett at koma við uppskoti um, hvussu Múrurin í Kirkjubø skuldi varðveitast. Nevndin kann ikki sigast at hava arbeitt serliga skjótt, tí í dag - seks ár seinni – er álitið enn ikki lagt fram. Formaðurin í nevndini sigur tað vera tyngsta nevndar-arbeiði, hann hevur verið við til**

KIRKJUBØMÚRURIN

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Aftaná nógva togtogan í fleiri ár um, hvat skuldi gerast við Kirkjubømúrin, setti táverandi landstýrismaður í mentamálum, Torbjørn Jacobsen í juni 2001 eina sokallaða "skjóttarbeiðandi" Múrnevnd, sum skuldi koma við tilmæli um varðveitingartiltøk viðvíkjadi Múrinum í Kirkjubø.

Í september 2002 legði nevndin eitt ávegis tilmæli fram fyri Annlis Bjarkhamar, sum tá var landsstýriskvinna í mentamálum. Seks ár eru nú liðin, síðani nevndin varð sett, men enn er endaliga tilmælið frá Múrnevndini ikki lagt fram.

Formaður í nevndini, Petur F. Zachariassen, væntar at tilmælið verður klárt at leggja fram seinni í summar. Men hann viðgongur, at arbeiði hevur gingið óvanliga striltið.

– Hetta er eitt tað tyngsta nevndararbeiði, eg havi verið við til, sigur hann. Í nevndini sita bæði umboð fyri myndugleikar, sum ynskja at varðveita og friða, og onnur, sum ynskja, at Múrurin møguliga skal kunna umvælast til eitthvørt endamál.

– Eg haldi, at fornfrøðingar hava rætt í, at Múrurin má varðveitast sum so, men tað hevur víst seg at vera torført at finna fram til, hvussu restaurering og varðveitsla skulu skipast.

Múrnevndin hevur tikið støði í teim tilmælum, sum arbeiðsbólkur í Forminnissavninum kom við í 1997. Hesin arbeiðsbólkur hevði eisini brúkt drúgva tíð, tí hann hevði arbeitt síðani 1986.

Símun V. Arge, deildarleiðari á fornfrøðideildini á Føroya Fornminnissavni, hevur verið við í allari tilgongdini og hevur eisini útgivið tilfar um Múrin. Hann greiðir frá, at høvðusendamálið alla tíðina hevur verið at varðveita Múrin so órørdan sum møguligt. Hetta er í samsvar við fakligar etiskar leiðreglur í altjóða konventiónum við atliti at varðveiting av ruinum og kann hetta fara at fáa týdning fyri møguleikarnar at koma við á World Heritage listan.

– Múrurin er eitt jarðfest fornminni og er tí automatiskt friðaður. Hetta forminnið er unikt, og tí má tað sum partur av Heimsarvinum varðveitast so upprunaligt sum til ber. Í 1997 legði Forminnissavnið fram eina verkætlan, men politikkur kom í málið. Landsstýrismaðurin tók málið til sín, og har hevur málið ligið síðani. Fornminnissavnið hevur tó áhaldandi arbeitt miðvíst við varðveitingararbeiðinum.

Símun V. Arge er samdur við Petur Zachariassen um, at nevndararbeiðið hjá Múrnevndini er komið væl ávegis.

**Uppfylging av ávegis áliti**

Í ávegis tilmælinum, sum nevndin handaði landstýrismanninum í 2002, varð mælt til at byggja veðurverju um Múrin. Hesar veðurverjur vórðu, sambært Símun V. Arge, uppsettar eftir løgdu tíðarætlanini. Rannsóknarpallar vóru eisini uppsettir, men hesir hava ikki verið brúktir, og ætlaðu kanningarnar komu ikki í